Sølufólk

Til skrivstovu okkara í Keypmannahavn verður søkt eftir sølufólki at byrja sum skjótast.

Starvslýsing
Tann, ið settur verður, skal hava ábyrgdina av sølufremjandi arbeiðnum á danska marknaðinum og kann í tí sambandi rokna við nakað av ferðing í Danmark.

Førleikakrøv
- Royndir frá ferðavinnuni
- Góður málkunnleiki
- Teldukunnleiki á brúkarastøði
- Kunnleiki til CRS (Amadeus)

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. desember.

SMYRIL LINE
Postboks 370
110 Tórshavn

Skattalistin fyri 1998

Skattalistin fyri Fuglafjar›ar kommunu liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni hvønn gerandisdag frá kl. 10.00-15.00. **frá 6. des. - 20. des. 1999.**

Fuglafjørður, tann 1. desember 1999

Fuglafjarðar býráð

Lýsið í **sosialinum**

Nýggjar TANNPROTESUR


Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

HANS BECH
húsasmiður
ALT INNAN HÚSASMÍÐ
Kongsgil 25 • 100 Tórshavn
far 21 25 61

SIEMENS

Gigaset Repeatari
Fullkomiliga leysur!




kr. 1195,00

Røkkur *Gigaset basisstøðin* ikki nóg langt? So kanst tú tvífalda fjarstøðuna við *Gigaset repeataranum* og hava sama rásarúm millum basisstøð og hondsett sum higartil. Á skrivstovuni ella heima økist fjarstøðan við 50 metrum afturat, og uttandura økist hon við upp til 300 metrum afturat.

Eisini fæst høvuðsett til *Gigaset 2015+ komfort* kr. 375,00
Eyka hondsett til *Gigaset 2010* kr. 695,00
Eyka hondsett til *Gigaset 2015+ komfort* kr. 895,00
Eyka hondsett til *Gigaset 2010 pocket* kr. 1195,00
Eyka loðari kr. 195,00

Gigaset 2060 isdn
Íbinding til framtíðina



kr. 2195,00

Basisstøðin *Gigaset 2060isdn* er ein tráðleysur Euro-ISDN-telefonútbúnaður.

Umframt ein biligan og munadyggan útbúnað, hevur tú eisini møguleika fyri at víðka um. Otta tráðleysar telefonir komfort- ella standardmodell kunnu bindast í uttan trupulleikar, og tvey analog tól, t.d. telefonsvarari og telefaks.

stephanssons hús

Siemens Gigaset 2015+ komfort
Svara alt samdøgrið



kr. 1595,00

Við *Gigaset 2015+ komfort* hevur tú allar fyrimunir við nýmótans telefoni í hondunum.

Hondsettið, ið fylgir við, *Gigaset 2000C*, hevur hópin av hentleikum. Til dømis lýsir skiggin á telefonini; hetta ger, at *Gigaset 2015+* komfort er løtt at handfara – bæði um dagin og um náttina.

Við *Gigaset 2015+ komfort* nýtist tær heldur ikki at vera heima fyri at svara teimum, ið ringja til tín. Tað ger innbygdi digitali telefonsvararin. Og fyri at gera tað upp aftur lættari, so siggjast øll boð við dato og tíð. Til ber at lurta eftir øllum boðum, ið eru givin um hondsettið, eins og øll data frá telefonsvararanum siggjast á skiggjanum.

Skal ringjast uppaftur, er bert at hyggja í telefonbókina: Her kunnu vera upp til 100 nøvn og nummur, so tað eru bert fá, ið rúm ikki verður fyri.

Siemens fartelefonir
S25



kr. 2995,00

Ein fullfiggjað samskiftisloysn til vinnulívsfólk og onnur, sum hava tørv á teimum fjølbroyttu møguleikunum, S25 fartelefonin gevur. Telefonin hevur innbygt mótald og kann senda og móttaka e-mail, telefaks og onnur data. Takkað verið tí infrareyða ljósinum ber til at samskifta við aðra útgerð uttan dyra eykaútgerð.

S25 er ein av teimum minstu og lættastu fartelefonunum á marknaðinum og hevur hópin av møguleikum t.d. kalendara, vibratur og upptakara (upp til 20 sek.). Virkar bæði á GSM 900 og GSM 1800 netinum.

C25



kr. 1775,00

Lítla nýggja *Siemens C25* fartelefonin hevur hópin av hentleikum. Nýtaravinarligt snið við ikonum, skerdum tali av knøppum og stórum skigga við høgari góðsku. Virkar bæði á GSM 900 og GSM 1800 netinum.

Siemens Gigaset 2010 pocket
Lítil, løtt og munadygg. Klár at koyra í lumman!



kr. 1695,00

Teir smáu lutirnir eru ofta teir bestu. Ein av hesum er Gigaset 2010 pocket við Gigaset 2000C hondsetti. Hon vigar bert 120 gr. og er ein fragd fyri eygað.

Snøgga sniðið livir upp til størstu arbeiðsligu krøvini. Menustyringin er einføld, og bæði skiggi og knappar hava bakgrundsljós.

Hóast Gigaset 2010C pocket er bæði lítil og snøgg, er hon drúgv. Hondsettið hevur upp til 9 tíma talutíð ella upp til 90 tíma bíðitíð. Í innbygdu telefonbókini er rúm fyri 100 nummurum við nøvnum.

Siemens Gigaset 2010
Ein klassikari við nymótans tøkni



kr. 995,00

Gigaset 2010 er tann biligasta loysnin innan tráðleysar telefonir, uttan mun til, um tað er til privata nýtslu ella til nýtslu á smærri virkjum. Við Gigaset 2010 í hondini, merkir tú, hvussu lítil, løtt og snøgg hon er. Eitt arbeiðsligt snið, umframt at lætt er at brúka teir nógvu hentleikarnar. Takkað verið tí digitalu DECT/GAP-tøknini merkir tú – samanborið við aðrar tráðleysar telefonir – eina stóra betring í mál- og ljóðgóðskuni.

Tórshavn 31 70 10 · Tvøroyri 37 10 00 · Søldarfjørður 44 10 00 · Norðstreymoy 42 10 00 · Klaksvík 45 74 88 · Sandur 36 10 00 · Miðvágur 33 20 00

TELEBUÐIN